# Flogfar neyðlendi

Eitt lítið flogfar noyddist at neyðlenda í Narsaq í Grønlandi í gjár, og tey bæði, sum vóru í flogfarinum, sluppu frá óhappinum uttan mein, skrivar Sermitsiaq. Blaðið sigur seg hava skilt, at flogfarið er skrásett í Svøríki, og at tað var á veg til Narsarsuaq. Men við Narsaq kom flogfarið í nógvan vind av landnyrðingi, og flogskiparin kendi seg noyddan at neyðlenda har. Hóast lendingin var heldur harðlig, fingu tey bæði fólkini ikki mein.



*Tað lítla flogfarið kom í nógvan vind og mátti neyðlenda*
*Mynd: Sermitsiaq*

# Meiri upp á land

Mars mánaður royndist væl hjá íslendska fiskiflotanum, sum veiddi átta prosent meiri enn í sama mánaði í fjør, men tað trongdi eisini til, tí í fyrsta ársfjórðingi fiskaðu íslendsk skip heili 11 prosent minni enn somu mánaðir í fjør. Í mars veiddu íslendsku skipini góð 18.000 tons meiri av lodnu enn í mars í fjør, men góð 13.000 tons minni av svartkjafti. Tey veiddu minni av toski, men meiri av kongafiski og hýsu, sigur íslendska hagstovan.



Alifelagið P/F FAROE SALMON:

# 20-faldar eginpeningin eftir trimum árum

**Roknskapartølini fyri 2007 streyma nú inn í roknskaparskipana hjá Business-line. Í hesum sambandi fer VINNAN í samstarvi við Business-line - BL.FO - við jøvnum millumbili at viðgera viðkomandi roknskapartilfar. Talan verður um stuttar roknskapargreiningar. Í dag lýsa vit alifelagið P/f Faroe Salmon**

ALING
*Finnur Sivertsen,*
*búskaparfrøðingur*
*Business-line*
*www.bl.fo*

At tað kann verða ótrygg tilvera at fáast við vinnulív í Føroyum, er alistøðin Faroe Salmon í Klaksvík eitt gott dømi um. Frá at hava havt nøkur góð ár seinast í nítiárunum og í ár 2000 ein vinning upp á slakar 38 mió. kr. fekk felagið tvey ár seinni eitt hall uppá slakar 39 mió. kr. Longu árið eftir máttu gomlu eigararnir avhenda lykilin til bankan.

Hóast trupulleikar við sjúkum og lágum prísum, eydnaðist tað at reka alibrúkið víðari, og er alistøðin í dag løgd inn undir P/f Faroe Salmon, sum er eitt dóttirfelag hjá P/f Bakkafrost Holding á Glyvrum.

Felagið rekur smoltaling og sjógvaling, bæði í Norðoyggjum og í Eysturoy, og tað er onki at taka seg aftur í, at leiðslan hjá Bakkafrost við sínum góða liði av starvsfólki hevur megnað at fingið eitt sera gott úrslit fyri 2007.

Faroe Salmon fekk í fjør eitt yvirskot áðrenn skatt upp á góðar 18 mió. kr samanborið við góðar 5 mió kr. árið 2006 og 13 mió kr. í 2005.

### Eginpeningurin 20-faldaður eftir 3 árum

Eginpeningurin hjá P/f Faroe Salmon var við árslok 2004 góðar 2 mió. kr. og er við árslok 2007 slakar 42,5 mió. kr., og er sostatt 20-faldaður hesi seinastu 3 árini.

Samstundis hevur felagið eitt sera gott eginpeningsavkast, 43% í 2007, móti 19% í 2006 og 73% í 2005.

### Góður vøkstur og fallandi marknaður

Felagið sigur í ársfrágreiðingini, at umstøðurnar til alivirksemi í Føroyum hava verið sera góðar í 2007. Vøksturin hevur verið góður, og fellið hevur verið lágt. Marknaðurin hevur tó verið støðugt lækkandi, tó at hann royndist hampuliga á heysti 2007.

### Gongdin í Chile kann ávirka alingina í Føroyum

Alivinnan í Chile hevur havt trupulleikar, og hetta kann ávirka marknaðarstøðuna í 2008. Verða trupulleikarnir størri enn mett, kemur hetta at hava við sær, at útboðið av laksi á heimsmarknaðinum minkar, og sostatt eru sannlíkindi fyri, at prísurin hækkar.

### Trupult at fáa arbeiðsmegi

Felagið ger vart við, at tað sum heild hevur verið trupult at fáast við framleiðsluvirksemi í Føroyum í 2007. Lítla tilfeingið av arbeiðsmegi ger, at tað í heilum mangla fólk í framleiðsluni. Hetta førir til verri virkisføri og hægri framleiðslukostnað.

| P/F Faroe Salmon | | 2007 | 2006 |
|---|---|---|---|
| **Eigari:** Bakkafrost Holding, Glyvrar | | | |
| Nettosøla | Mió. | 117 | 80 |
| Bruttoúrslit | Mió. | 54 | 32 |
| Úrslit áðrenn skatt | Mió. | 18 | 5 |
| Eginogn | Mió. | 43 | 27 |
| Eginpeningsavkast | % | 43 | 19 |
| **Stjóri:** | Regin Jacobsen | | |
| **Nevndarform.:** | Líggjas í Bø | | |